## VEÐRIÐ



Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur greiðir frá um veðrið




**Veðrið í dag:**
Stívt andøvsgul upp í hvassan vind av landnyrðingi, um kvøldið minni vindur. Stundum vátaslettingur ella kavi og hitin millum frostmarkið og +3 stig.




**Veðrið leygardagin:**
Hann veksur vindin upp í hvassan vind av norði og kavaælingur, men eisini onkur sólglotti. Hitalagið millum +1 og ÷2 stig – sunnunáttina niður í ÷7 stig.




**Veðrið sunnudagin:**
Lot til andøvsgul av útnyrðingi, seinnapartin lot av ymsum ættum. Yvirhøvur turt og sólglottar og hitalagið millum ÷2 og +1 stig.

**Veðrið mánadagin og týsdagin:**
Stívt andøvsgul upp í hvassan vind av útsynningi og stundum regn ella ælingur. Hitin millum 4 og 8 stig.



*Fyrsti landsstýrisfundur hjá nýggja landsstýrinum var hósmorgunin.*
*Mynd: Jens Kr. Vang*

# Bjarni Djurholm verður varaløgmaður

**Tað verður Fólkafloksmaðurin, Bjarni Djurholm, sum skal røkja løgmansessin, tá Jóannes Eidesgaard verður burturstaddur. Nýggja landsstýrið hevði sín fyrsta landsstýrisfund hósmorgunin**

FYRSTI LANDSSTÝRISFUNDUR
*Páll Holm Johannesen*
*pall@sosialurin.fo*

Landsstýrismaðurin í vinnumálum, Bjarni Djurholm, verður nýggjur varaløgmaður. Seinastu seks árini hevur Høgni Hoydal røkt hesa uppgávu. Nú Tjóðveldisflokkurin er endaður í andstøðu, er nýggja ABC-samgongan komin ásamt um, at Fólkafloksmaðurin, Bjarni Djurholm verður varløgmaður

**Fyrsti landsstýrisfundur**

Fyrsti landsstýrisfundur hjá ABC-samgonguni var hósmorgunin. Hjá Hans Paula Strøm, Jógvani við Keldu, Jógvani á Lakjuni, Bárða Nielsen og Johan Dahl var talan um fyrsta landsstýrisfund nakrantíð. Byrjað varð við morgunmati og síðan var farið til fundarborðið.

Embætisfólk á Løgmansskrivstovuni vóru eisini til staðar. Teirra uppgáva hósmorgunin var fyrst og fremst at læra nýggju landsstýrismenninar vanligu mannagongdina í samband við landsstýrisfundir.

### Hitalagið kring knøttin

| | |
|---|---|
| Illulisat | ÷20 |
| Nuuk | ÷8 |
| Qaqortoq | ÷4 |
| Ammassalik | ÷9 |
| Saint John's | ÷3 |
| Halifax | 2 |
| Reykjavík | 0 |
| Seyðisfjørður | 1 |
| Tórshavn | 5 |
| Lerwick | 7 |
| Aberdeen | 9 |
| London | 15 |
| Tromsø | ÷4 |
| Bergen | 7 |
| Oslo | – |
| Stokkhólm | 6 |
| Keypmannah. | 8 |
| Helsinki | 2 |
| Moskva | ÷2 |
| Berlin | 13 |
| Warzawa | 9 |
| Kiev | 4 |
| Bukarest | 2 |
| Paris | 15 |
| Madrid | 13 |
| Róm | 12 |
| Malorca | 13 |
| Athen | 13 |
| Malta | 17 |
| Tunis | 14 |
| Beijing | 0 |
| New Dehli | 19 |
| Bangkok | 31 |
| Jakarta | 30 |
| Sydney | – |
| New York | 5 |
| Miami | 24 |
| Los Angeles | 13 |
| Meksikobýur | 19 |
| Panama | 33 |
| La Paz | 13 |
| Rio de Janeiro | – |
| Buenos Aires | 26 |

### LUFTTRÝSTIÐ




Eitt lágtrýst, 989 hPa. í landnyrðing úr Føroyum fer eystureftir. Eitt annað lágtrýst, 996 hPa. vestan fyri Írland fer í landnyrðing og dýpist nakað.




Eitt lágtrýst yviri á Suðurlandinum fer spakuliga í landsynning og hevur kalda luft við sær á okkara leiðum.

### HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 04/02 kl. 06[00]– 05/02 kl. 06[00]. Hitin í gjár: 4,3°
Minsti hiti máldur í feb.: ÷11,0° - Mesti hiti máldur í feb.: 11,0°

### AVFALLIÐ




Avfallið: 0,0 mm – mált frá 04/02 kl. 06[00]–05/02 kl. 06[00]
Avfallið higartil í februar: 30,6 mm

I EINUM SAMFELAG HAR TEY VEIKASTU HAVA TAÐ GOTT, HAVA ØLL TAÐ GOTT

WWW.JAVNI.FO

JAVNI

## VESTFALLSKYRRINDI

31. januar: Mánin longst frá jørðini
6. februar: Fyrra kvarter
16. februar: Mánin longst frá jørðini

Kelda. Álmanakkin 2004

| Dagur | Suðuroyar-/Vágafirði fp. | sp. | Skúvoyar-/Skopunarfirði fp. | sp. | Hestfirði/Sundalagnum fp. | sp. | Vestmannasundi fp. | sp. | Mykinesfirði fp. | sp. | Nólsoyarfirði fp. | sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | sp. | Leirvíksfirði/Haraldssundi fp. | sp. | Kalsoyar-/Svínoyarfirði fp. | sp. | Hvannasundi fp. | sp. | Fugloyarfirði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 6. feb | 06.45 | 19.07 | 05.45 | 18.07 | 06.00 | 18.22 | 08.45 | 21.07 | 09.45 | 22.07 | 05.00 | 17.22 | 04.00 | 16.22 | 07.00 | 19.22 | 08.00 | 20.22 | 06.30 | 18.52 | 07.45 | 20.07 |
| 7. feb | 07.29 | 19.50 | 06.29 | 18.50 | 06.44 | 19.05 | 09.29 | 21.50 | 10.29 | 22.50 | 05.44 | 18.05 | 04.44 | 17.05 | 07.44 | 20.05 | 08.44 | 21.05 | 07.14 | 19.35 | 08.29 | 20.50 |
| 8. feb | 08.11 | 20.31 | 07.11 | 19.31 | 07.26 | 19.46 | 10.11 | 22.31 | 11.11 | 23.31 | 06.26 | 18.46 | 05.26 | 17.46 | 08.26 | 20.46 | 09.26 | 21.46 | 07.56 | 20.16 | 09.11 | 21.31 |
| 9. feb | 08.52 | 21.11 | 07.52 | 20.11 | 08.07 | 20.26 | 10.52 | 23.11 | 11.52 | — | 07.07 | 19.26 | 06.07 | 18.26 | 09.07 | 21.26 | 10.07 | 22.26 | 08.37 | 20.56 | 09.52 | 22.11 |

5 707265 100050 >